# Føroyskar svimjigentur fagnaðar



*Føroysku gullgenturnar prógvaðu enn einaferð, at tær hoyra til í absolutta heimsoddinum*

**Tað er ikki oftani, at móttøka er fyri einum heimsmeistara í Føroyum, men mánakvøldið var hetta tað, sum hendi. Tær báðar, Esther og Heidi, vórðu uppiborið fagnaðar av vinum, kenningum og stuðlum**

AFTURKOMA
*Orð: Heri á Rógvi*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Hornorkestur var møtt upp, og fitt av fólki legðist afturat. Øll vóru komin niðan í Gundadal fyri at heira tær báðar, Esther og Heidi.

Høvuðsstuðulin hjá ÍSB, sum er sersambandi hjá brekaðum í Føroyum, hevði boðið til eina móttøku mánakvøldið. Borðreitt var við onkrum søtum til tey, ið høvdu valt at leggja leiðina framvið Gundadal hetta kvøldið.

Eina góðan hálvan tíma eftir at fyrstu fólkini vóru møtt, komu tær báðar í einum bili, og tað var beinanvegin, at tónleikurin byrjaði frá hornorkestrinum, sum ikki spardi uppá krútið, men legði fyri við »Congratulations« hjá Cliff Richard, og ikki kann sigast annað, enn at hesin sangurin hóskandi væl til.

Tær báðar fingu síðani nøkur væl uppiborin klemm, og tað vóru mong, sum vildu ynskja teimum báðum hjartaliga tillukku, og tær báðar funnu eisini tey stóru smílini fram. Tað sá eisini út sum um, at tær báðar vóru vorðnar vandar við at ganga so tungum metalli og fínum um hálsin.

## Røður

Einki tiltak uttan nakrar røður frá nøkrum politikarum. Fólkið, ið var møtt upp mánakvøldið, skuldi heldur ikki snýtast fyri hetta, og teir vóru heldur ikki minni enn tríggir í tali, sum tóku mikrofonina í hond, og søgdu samkomuni, hvat tær hildu um megnaravrikini hjá teimum báðum.

Umframt formannin í ÍSB, Egga Jensen, vóru røðarnir hetta kvøldið Jan Christiansen, borgarstjóri, Heðin Mortensen, formaður í ÍSF og Tordur Niclasen, borgarstjóri.

Allir vóru teir sera fegnir um úrslitini hjá teimum báðum. Allir nýttu eisini høvi til at nevna, hvussu stórt arbeiði er farið í hetta, og at tær ikki vóru komnir sovandi til sigurs.

Genturnar fingu gávu frá Tórshavnar Kommunu og blómur frá ÌSF, ÍSB, Eiðis Kommunu og Stuðulsfelagnum hjá ÍSB, sum avgjørt eigur sín stóra part í góðu úrslitunum hjá ÌSB.

Tordur Niclasen var sjónliga rørdur, og hann nevndi eisini, hvussu errin tey vóru av Heidi í heimbygd hennara, Eiði.

## Sera fegnar

Eftir at røðurnar vóru fingnar frá hondini, og áðrenn fólki slap at leska av sær av tí, sum var sett á borðið, so áttu fjølmiðlarnir tørn at spyrja spurningar.

Tá tær vórðu spurdar, um tær kundu seta orð á, hvat hetta hevði at siga fyri tær, søgdu tær báðar, at hetta hevði ovurstóran týdning fyri tær, og tær vóru eisini fegnar yvir, at teimum hevði gingist so mikið væl.

Sjálvar høvdu tær ikki væntað, at úrslitið fóru at gerast so góð, sum tey gjørdust, men tær høvdu sett nøsina upp ímóti at betra um teirra persónligu met.

Heidi segði, at hevði kanska eina vóna um at standa ovast á sigursskamlinum einaferð, men at hon skuldi uppliva hetta fýra ferðir, hevði hon ikki droymt um.

Tær báðar søgdu eisini, at tær høvdu eitt sindur av nervum frammanundan kappingini, men hetta gekk yvir. Heidi segði eisini, at tað kendist óføra stuttligt at hoyra »Tú alfagra land mítt« í stóru svimjihøllini í Stockholm.

## Betri umstøður

Eisini venjarin hjá teimum báðum, Katrin Johansen, tók orðið mánakvøldið. Hon segði, at leingi hevur valt at tiga, men hon kendi seg noydda at koma við einum hjartasuffi.

Katrin segði, at hon sakni alnógv betri umstøður fyri svimjarnar. Skal framgongdin halda fram, og skulu fleiri gera seg galdandi á sama støði, so verður neyðugt at skapa betri karmar fyri svimjarnar.

Serliga sóknaðis Katrin eftir einum 50-metra svimjihylið, tí tær hvørja ferð, tær ætla sær uttanlands at kappast, mugu leita í onnur lond áðrenn kappingina fyri at fáa neyðugu venjingina í longra hylinum.

Tá hon varð sprud, um góðu úrslitini hjá teimum báðum ikki vóru eitt tekin um, at umstøðurnar vóru nøktandi, segði hon, at eftirsum tær einans eru tvær gentur, so ber til at fáa líkinda úrslit burturúr, men hetta krevur rættiliga nógv av teimum báðum, venjaranum og familjunum.

## Til Argentina

Hóast tær báðar nú hava fingið hesi frálíku úrslit, so ætla tær ikki at steðga á nú, men heldur fara tær aftur at leita sær út í onnur lond.

Fyrst av øllum stendur ein kapping í Norra á skránni, men í 2002 bíðar eitt møgulig heimsmeistarakapping eftir teimum báðum, har tær veruliga sleppa at royna seg. Hetta krevur tó nógva venjing og ikki minst nógvar pengar, men tær hava góðar vónir.

Sosialurin ynskir teimum øllum hjartaliga tillukku.



*Katrin Johansen, sum her sæst saman við gullgentum sínum, kom undir móttøkuni við einum hjartasuffi, tá hon eftirlýsti betri venjingarumstøður til svimjararnar*



*Júst afturkomin er altíð gott at fáa klemm frá teimum nærmastu*



*Borgarstjórin á Eiði taldist eisini millum teirra, sum heiðraðu avrikinum hjá*



# Kunnu missa arvasilvurið

**Eitt gott avrik frá FCK kann viðføra, at teir verða noyddir at selja burtur av leikarahópinum, og útlendskur áhugi tykist vera fyri fleiri av leikarunum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



Hóast italska Lazio eru stórfavorittar til ein samlaðan sigur á FCK, so hava tey í danska høvuðsstaðnum langt í frá mist vónirnar um, at leikarar teirra kortini fara at fremja eitt gott avrik.

## Gott avrik kann kosta

Trupulleikin í hesum sambandi er tó, at avrikið hjá onkrum av leikarunum hjá FCK kann gerast somikið gott, at teir verða noyddir at selja burtur av leikarahópinum, sum eftir donskum viðurskiftum er rættiliga stjørnusettur.

FCK hevur í dag ein leikarahóp upp á heilar 31 leikarar, og hóast hetta ikki er nakar fíggjarligur trupulleiki, soleiðis sum tað er hjá mongum øðrum feløgum, so er greitt, at venjarin neyvan hevur tørv á øllum hesum.

Ítróttarliga vildi helst verið skilabest, um selt varð av lakara endanum av hópinum, men áhugin frá øðrum feløgum snýr seg sjálvsagt fyrst og fremst um bestu leikararnar, og kemur eitt nóg stórt boð úr onkrum útlendskum felagi, kann væl verða, at Flemming Østergaard verður noyddur at siga jú takk.

## Zuma og Laursen

Fyrst og fremst verður roknað við, at suðurafrikanski Sibosiso Zuma er ein leikari, sum útlendsk feløg hava áhuga fyri. Umframt at hann bæði í fjør og higartil í ár hevur sýnt stórspæl í fleiri dystum, so ferðaðist vakra saksaspark hansara í avgerandi dystinum móti Brøndby í fjør kring sjónvarpsskíggjarnar í Europa, og roknað verður fyri vist við, at eitt gott avrik frá honum mikudagin kann senda hann til Italia.

Sjálvur tykist Zuma heldur einki at hava ímóti hesum. Suðurafrikanin er nú 24 ára gamal, og í seinastuni hevur ljóðað, at hann ikki trívist so væl í Danmark, og tí er áhugaður í at royna seg aðra staðni.

Roknað verður við, at Zuma í øllum førum kann seljast fyri einar 30 milliónir krónur, og eru nóg nógv feløg um boðið, tykjast tær 50 milliónirnar als ikki at vera veruleikafjarðar.

Harumframt hevur sterki verjuleikarin, Jacob Laursen, eisini sagt seg vera áhugaðan í at koma uttanlands. Hann er komin nakað upp í árini, og verður tí neyvan seldur fyri teir heilt stóru pengarnar, men hinvegin er neyvan nøkur nytta hjá FCK at halda fast um ein leikara, sum als ikki vil spæla við felagnum.

## Selja ikki enn

Ítróttarstjórin í FCK, Niels Christian Holmstrøm, hevur áður sagt, at teir í FCK so avgjørt ikki ætla at selja nakran sum helst, fyrr enn teirra leiklutur í Europa er liðugur á hesum sinni.

Skuldi tað hent seg, at FCK vinnur seg fram í bólkaspælið í meistarakappingini, hava leikararnir neyvan nakað ímóti at taka eitt tørn afturat fyri felagið, tí hetta kann samstundis vera tann heilt stóri sýnisgluggin mótvegis europeiskum stórfeløgum.

Verður talan um samanlagt tap móti Lazio, hevur FCK enn UEFA-Cup kappingina at stríðast fyri, og spurningurin er, hvat tá fer at henda. Hendan er als ikki eins áhugaverd hjá veruliga stóru feløgunum, og spurningurin er so, hvat Holmstrøm og Østergaard siga, um eitt boð um tær hálvt hundrað milliónirnar skuldi komið upp á Zuma. Hetta kundi hóskandi komið úr Udinese, har Roy Hodgson nú er venjari, men gitingarnar hesum viðvíkjandi eru so nógvar, at vit ikki nerta meira við tær á hesum sinni.

# Fullsett í Parkini



*Parkin verður allar helst fullsett, tá FCK móti italska stórfelagnum, Lazio, fer at gera eina roynd at vinna seg fram í europeisku fótbóltselituna*

**Sjáldan hevur áhugin fyri einum donskum Europa-Cup dysti verið so stórur, sum hann verður mikukvøldið**

EUROPA-CUP
*Jákup Mørk*

Leitast skal helst aftur til Europa-Cup ævintýrið hjá Brøndby í 1991, fyri at finna nakað, sum kann samanberast við støðuna í Danmark, nú italska Lazio kemur á vitjan í høvuðsstaðnum.

Roknað verður við einari fullsettari Parken, tá liðini bæði fara á vøllin, og eisini millum fjølmiðlarnar er áhugin fyri dystinum sera stórur. Í alt verður roknað við, at eini 120 fjølmiðlafólk vera til dystin, og koma hesi úr fleiri av mætastu fótbóltstjóðunum í Europa. Sjálvsagt er áhugin úr Italia stórur, men harumframt veit heimasíðan hjá FCK at siga, at talan verður um fjølmiðlafólk úr bæði Noreg, Týsklandi og Onglandi.

Umframt hetta, verða føroyskir fjølmiðlar eisini á staðnum. Jóannes Hansen fer at umboða Sosialin til dystin, og væntandi verður nakað at frætta frá honum í fríggjadagsblað okkara.

Annars fer sjónvarpsrásin, TV3, at senda beinleiðis frá dystinum, so hyggjarar hjá Rás Tórshavn eins og tey, sum hava atgongd til eina parabvol við digitalum dekodara, kunnu fylgja við, hvussu gongst FCK í royndunum at vinna sær atgongd til sterkastu europeisku kappingina.

# HB og ikki B36

**Toppdysturin í bestu mansdeildini verður sum ætlað avgreiddur 19. august**

Í blaðnum í gjár hevði eitt mistak sníkt seg inn, tá vit umrøddu gongdina í bestu mansdeildin. Har stóð, at dysturin millum B36 og GÍ, sum skuldi verið leiktur í trettanda umfarinum, var fluttur frá 19. august til 12. september.

Hetta er sjálvandi ikki rætt. B36 og GÍ spæla oddadystin sum ásett, men hinvegin er ein annar dystur hjá GÍ fluttur. Talan er um dystin móti HB, sum skuldi verið leiktur komandi leygardag. Gøtumenn verða ikki aftur í Føroyum úr Jugoslavita fyrr enn leygardagin, og tískil er vónleyst at spæla hendan dagin. Tí er hesin dysturin fluttur til ta í føroyskum fótbólti so søguligu ásetingina, 12. august.

Vit biðja lesararnar halda okkum til góðar.

*- blðm*